# Dansur við Kíkum í Losjuni í Gøtu

DANSUR

Komandi leygarkvøld 17. desember kl. 23.00 spælir gamla orkestrið Kíkar til dans í Losjuni í Gøtu.

Orkestrið spældi nógv til dans í Eysturoynni og restuni av Føroyum í tíðarskeiðnum 1981-85. Við í bólkinum eru Jóhan Danielsen (sangari), Jákup Olsen (bass guitar), Jóannes Mikkelsen (tangentar), Hjalti Joensen (guitar) og Petur Martin Petersen (trummur).

Við hetta kvøldið verður eisini ein gestatónleikari á orgul, hesin verður lýstur seinni.

Kíkar spæla góðan gamlan 70'ara rokk, so sum Uriah Heep, Deep Purple, Beatles, Doctor Hook og Santana.

Bólkurin gavst at spæla árskiftið 1984-85. Sangarin Jóhan Danielsen hevur seinastu 15 árini búð í Danmark og er komin heim í hesum sambandi.

Kíkar vera ikki bert at hoyra komandi leygarkvøld, men spæla eisini til dans í Støkkhøllini á Glyvrum 2. jólakvøld og gamlaárskvøld.



*2 av tónleikarunum í Kíkum: Hjalti Joensen úr Runavík, sum er ein tann kendasti guitaristurin í Føroyum. Hann hevur spælt við í nógvum føroyskum bólkum gjøgnum árini, m.a. Moirae, Terji Rasmussen Band og Devon. Jákup Olsen úr Saltangará, sum spælir bass guitar í Kíkum. Jákup spælir enn av og á til ymisk tiltøk saman við ymiskum føroyskum bólkum.*

# Non Stop Nýggjárskonsert

Nýggjárskonsertin annað jólakvøld verður hildin á tveimum pallum. Hetta er gjørt soleiðis at sleppast skal undan keðiligum steðgum, tá pallskifti er. Hip Hop dansibólkurin bólkurin The Black& White fer at undirhalda á minna pallinum, meðan tónleikabólkarnir gera klárt á stóra pallinum.

Luttakandi bólkarnir í ár eru Páll Finnur Páll, Lama sea, SIC, The Message, The Dreams og The Story Ends featuring Side Effect.

**nus**

# Zenden spælir ikki hetta kappingarárið

Liverpool miðvallarleikarin Boudewijn Zenden spælir neyvan fótbólt aftur hetta kappingarárið, skrivar www.soccernet.com. Zenden fekk ein knæðskaða í heimadystinum ímóti Real Betis í Champions League her fyri.

Skaðin í liðbondunum í knænum tykist at vera so ringur, at hálendski leikarin mikudagin fer til USA, har kendi læknin Richard Steaman í Kolorado væntandi fer at leggja hann undir skurð.

Zenden kom úr Middlesbrough í summar, men hevur áður spælt fyri Chelsea, Barcelona og PSV Eindhoven. Zenden varð seldur til Middlesbrough, tá Chelsea keypti Arjeen Robben, ið eisini hevur yvirtikið plássið á hálendska landsliðnum frá Zenden.

Í Middlesbrough var Zenden ein sera týdningarmikil leikari, men tá hansara sáttmáli við Middlesbrough var av í summar, vóru Liverpool til reiðar við einum tilboði.

Eitt umboð fyri Liverpool sigur við heimasíðuna hjá felagnum, at tað ikki er sannlíkt, at Zenden spælir aftur hetta kappingarárið

**nud**

# Petsi Tvørfoss saman við Sofia Ghoula á klaver

**Jólakonsert verður í Gøtu kirkju sunnudagin 18. desember kl. 20**

KONSERT



*Petsi Tvørfoss (til høgru) og Sofia Ghoula (til vinstru).*

Petsi Tvørfoss er kend av flest føroyingum fyri luttøku sína í Danska Melodi Grand Prix 2004, og munnu flest vera varug við hennara framúrskarandi rødd og sangevnir.

Petsimeistrarymiskarsangsjangrur, og hevur roynt og víst síni evnir í so ymiskum sum traditionellum kórsangi og kirkjukórið sum 1. supran, og ofta sum solistur, eins og í rútmiskum tónleikabólkum og sum rútmiskur solistur. Í Jyllandi, har Petsi búleikast, er hon eftirspurd til bæði privat sum til almen tiltøk, og hevur m.a. framført fyri Dronning Margretu á vitjan í Jyllandi.

Í Føroyum hevur Petsi áður havt jólakonsert, kirkjukonsertir saman við Vor Frue Kirkes Kor, eins og rútmiskar konsertir við bólki, m.a. á summarfestivalinum.

Petsi víðari útbúgvir seg á Jysk Musikkonservatorium í Århus eins og Sofia Ghoula, sum hevur klaverundirspæl og syngur kór á konsertini. Tær hittust á konservatoriðinum, hava spælt nógv saman hetta seinast 1½ árið, men er hetta einans onnur konsert teirra saman.

Nógv ymisk verður á skránni á konsertini, so sum føroyskir jólasálmar í nýggjum hami, gospel tónleikur, løg Petsi og Sofia sjálvar hava skrivað og mangt annað – við ørðum orðum, eitt sindur av hvørjum.

Petsi og Sofia vóna soleiðis at fáa eina hugnaliga løtu saman við áhoyrarunum í Gøtu Kirkju síðsta sunnudag fyri jól kl. 20:00.

# »Høgifossur« verður seismikkskip

**Í gjár fór »Høgifossur« úr Føroyum til Pólands, har skipið skal umbyggjast til seismikkskip**

SKIPASØLA



Skipið bleiv keypt vegna kunda hjá skipsmeklaravirkinum Maretec á Argjum á tvingilssølu í Føroya fútarætti 21.oktober í ár. Síðani tá hevur skipið ligið við bryggju í Miðvági.

Meðan skipið hevur ligið í Føroyum, er bjálvingin tikin burtur úr frystilastini, spølini eru avmonterað, og tekningar eru gjørdar av umbygginini ið skal gerast.

Skipið verður skrásett í Bahamas og skal eftir ætlanini fara í vinnu sum seismikkskip í apríl-mai 2006.

Møguliga koma vit at síggja skipið aftur í Føroyum í øðrum líki einaferð í framtíðini í samband við frálandavinnuna - hvør veit?

# Rentan á gomlu lánunum lækkar

**Føroya Sparikassi setti í gjár rentuna á 1. veðrættarlánunum til bústaðir niður á 3,45 prosent p. a. Saman við nýggju realkredittlánunum, ið Føroya Sparikassi sum tann einasti í Føroyum bjóðar, merkir rentulækkingin, at Sparikassin er mest kappingarføri peningastovnur á føroyska bústaðarmarknaðinum**

BÚSKAPUR

*Tíðindaskriv*
*Føroya Sparikassi*

Kundar í Føroya Sparikassa fáa frá í dag fyrimun av, at Sparkassin lækkar rentuna á 1. veðrættarlánum til bústaðir. Rentan á gomlu lánunum er nú 3,45 prosent, har hon frammanundan var 4,25 prosent p. a. Rentulækkingin umfatar allar kundar við 1. veðrættarláni til bústað í Føroya Sparikassa og hevur virknað, uttan at kundar nýtast at umleggja lánini og gjalda fyri tað.

- Føroya Sparikassi er størsti bústaðarfíggjari í Føroyum, og kundar okkara skulu kunna rokna við, at Sparikassin er kappingarførur. Tað er orsøkin til, at rentan á teimum gomlu lánunum fer niður nú, sigur Marner Jacobsen, forstjóri í Føroya Sparikassa, sum samstundis vísir á, at ongin trygd er fyri, at rentan verður verðandi á hesum søguliga lága rentustøðinum, og tað er tí eitt gott hugskot at seta seg í samband við Sparikassan um nýggju tilboðini um realkreditt.

Hóast rentan á teimum gomlu 1. veðrættarlánunum nú lækkar, hevur tað avmarkaðan týdning fyri lántakaran, hvør rentan á bústaðarlánunum er her og nú.

- Avgerandi er, hvussu nógv ella lítið, tú skalt gjalda í rentu og avdráttum komandi 5, 10, 20 ella 30 árini, og her er tað, at realkredittfíggingin í Sparikassanum veruliga ger mun. Við realkredittláni ber millum annað til at læsa rentuna fasta í stutt ella long tíðarskeið. Hetta kann hava stóran týdning, nú nógv bendir á, at rentuhækkingar standa fyri framman, sigur Marner Jacobsen.

Sparikassin bjóðar sum einasti føroyski peningastovnur eina røð av realkredittlánum til verandi og komandi føroyskar bústaðarkundar. Lánini kunnu hava fasta rentu, rentutillaging ella rentuloft, vera upp til 30 ár og hava avdráttarskáða í upp til 10 ár. Harumframt ber framhaldandi til at fáa gomlu sethúsalánini til skiftandi rentu, eins og tað á gomlu lánunum sjálvandi framvegis er møguligt at fáa avdráttarskáða í avmarkaða tíð, uttan at tær nýtist at telja klipp ella avtala hetta, tá lánið verður stovnað.